

*Harafturat, er hann ein av teimum fáu, sum kann breggja sær av at hava spælt saman við The Dreams*



*- Eg var bara ein túr í SMS. Vit stóðu og hugdu, tá vinfólkini byrjaðu at lokka meg upp á pallin. Til endans segði eg ja, og lænti ein gittara frá einum klaksvíkingi, sum akkurát hevði verið á senuni, sigur Ragnar Finsson*

er eisini løgin, tí sigur Ragnar Finsson. Spurdur hvat hini søgdu, vildi Ragnar ikki siga, tí tað er eitt loyndarmál.

## Errin

Men Ragnar dylur ikki fyri, at hann er errin av at vera við í sendingini.

- Guðrun Sólja vann, Vígdis vann og Jógvan Hansen vann eisini, og eg havi onki ímóti at vera sammettur við tey, sigur Ragnar Finsson, við einum loyndarfullum andlitsbrái.

Sendingin við dronginum, sum kann gerast nýggja hjartabarn føroyinga, verður at síggja fríggjadagin 5. septembur.

## FAKTA

Talent 2008 er kapping, sum DR1 skipar fyri. Ætlanin er at finna størstu talentið óansæð kynstur. Sambært DR1 kann gera tað sama, hvørt talan er um sangarar, dansarar, eldslúkarar ella um mann kastar við lutum. Ætlanin er bert at finna størsta talentið.

Talent 2008 verður mett sum ein sending, ið er sprottin úr røtrunum hjá X Factor, sum Jógvan Hansen úr Klaksvík vann íslendsku útgávuna av.

Kendasta úrslitið av Talent kappingini, sum hevur verið í fleiri londum, er helst Poul Potts, sum var í bretsku útgávuni av sendingini.

Talent 2008 byrjaði í veruleikanum í maimánaði, tá fleiri upptøkuroyndir vóru í Danska kongaríkinum. Upptøkurnar byrjaðu í juni, og nú verða sendingarnar vístar. Um stutta tíð verða allar sendingarnar beinleiðis, har til ber at senda sms-boð inn, men dómararnir, Martin Hall, multikunstnari, Peter Jensen, filmsframleiðari og Julie Steincke, sangleiksstjørna, hava eisini sítt at siga.

Tá finalan verður á skránni verða dómararnir skúgvaðir til viks, og hyggjararnir avgera einsamallir hvør gerst Talent 2008.